## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, seinnapartin upp í ein strúk av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og regn av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin minkar hann vindin av norði og um kvøldið lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar. Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin báðar dagar millum 8 og 12 stig.

# Blaðvespur gera um seg

SKORDÝR



Í summar hava mong verið plágað av skaða frá einum óbodnum skordýri í urtagarðinum. Skordýrið, sum sæst á myndini, hevur fullkomiliga avpiðað bløðini á ávísum træ- og runnasløgum, soleiðis at bert blaðnervarnar standa eftir.

Talan er um ormveruna hjá eini í aðrar mátar heilt meinaleysari blaðvespu av ættini Nematus sp, skrivar Umhvørvisstovan á heimasíðuni. Blaðvespan verpur víggið á bløðini, og eftir fáum døgum (alt eftir hitalagnum) klekjast ormverurnar og leggja beinanvegin á at eta blaðkjøtið. Síðani dettur reivveran niður úr trøunum og búnast á vøllinum til liðugt skordýr. Tað kunnu klekjast upp í heili tvey ættarlið eftir einum sumri. Nógv sløg eru av Nematus blaðvespun, men hon, ið hevur gjørt mest um seg í Føroyum í summar, er ivaleyst tann við tí látínska navninum Nematus pavidus. Tað finst einki føroyskt ella skandinaviskt navn á júst hesum slagnum.

Serliga eru tað ymisk sløg av píli, ið hava verið illa viðfarin av júst hesum ormveruálopunum í summar. Eisini onnur plantusløg, eitt nú Stikkulsber og aðrir berjarunnar, hava somuleiðis verið rakt (helst er talan tá um onnur sløg av Nematus ættini). Ógreitt er, hvussu ymiskt skaðin hevur verið kring landið. Slík álop eru sædd fleiri ferðir áður, tó vanliga við fleiri ára millumbili.

Góða summarið, er ivaleyst høvuðsorsøkin til nógvu ormverurnar í ár. Til at basa ormverurnar er frægast at nýta eina havaslangu við spreydysu á til at spula planturnar við. Hetta vil fáa flestu ormverurnar at detta av bløðunum og niður á vøllin og fara fyri einki. At rista greinarnar, ella at busta tær í teimum førum, har tað letur seg gera, fær somuleiðis nógv tær flestu ormverurnar at detta úr bløðunum.

Smáfuglarnir eru ógvuliga grammir eftir blaðvespu ormverunum, so teir hava góðalív í hesum døgum. Trø og runnar taka vanliga ikki stórvegis skaða ella fáa varandi mein. Eftir eitt hervíligt álop, kann vøksturin vera slakari árið eftir, men vanliga standast ikki onnur mein. Á føroyska portalinum www.faroenature.net síggjast eisini myndir av Nematus blaðvespum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 16 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1023 hPa. vestan fyri Írland við einum hátrýstryggi til Grønlands fer eystureftir.

**Komandi nátt:**
Hátrýstryggurin við Føroyar viknar. Lágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/08 kl. 06⁰⁰ – 06/08 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,5°
Minsti hiti máldur í august: +0,4° -
Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 05/08 kl. 06⁰⁰ – 06/08 06⁰⁰.
Avfallið higartil í august: 20 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august – Mánin longst frá jørðini
13. august – Seinna kvarter
19. august – Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13.aug | 00:09 | 12:45 | 11:45 | - | - | 12:00 | 02:09 | 14:45 | 03:09 | 15:45 | 11:00 | 23:39 | 10:00 | 22:39 | 00:24 | 13:00 | 01:24 | 14:00 | - | 12:30 | 01:09 | 13:45 |
| 14.aug | 01:24 | 14:03 | 00:24 | 13:03 | 00:39 | 13:18 | 03:24 | 16:03 | 04:24 | 17:03 | - | 12:18 | 11:18 | 23:45 | 01:39 | 14:18 | 02:39 | 15:18 | 01:09 | 13:48 | 02:24 | 15:03 |
| 15.aug | 02:30 | 14:58 | 01:30 | 13:58 | 01:45 | 14:13 | 04:30 | 16:58 | 05:30 | 17:58 | 00:45 | 13:13 | - | 12:13 | 02:45 | 15:13 | 03:45 | 16:13 | 02:15 | 14:43 | 03:30 | 15:58 |
| 16.aug | 03:26 | 15:55 | 02:26 | 14:55 | 02:41 | 15:10 | 05:26 | 17:55 | 06:26 | 18:55 | 01:41 | 14:10 | 00:41 | 13:10 | 03:41 | 16:10 | 04:41 | 17:10 | 03:11 | 15:40 | 04:26 | 16:55 |
| 17.aug | 04:24 | 16:53 | 03:24 | 15:53 | 03:39 | 16:08 | 06:24 | 18:53 | 07:24 | 19:53 | 02:39 | 15:08 | 01:39 | 14:08 | 04:39 | 17:08 | 05:39 | 18:08 | 04:09 | 16:38 | 05:24 | 17:53 |





